# Kendur professari í løgfrøði góðkennir partabrævahandil í Atlantic Airways



**Í løgfrøðiligari frágreiðing um partabrævahandilin í Atlantic Airways í juni 2008 slær danski professarin í løgfrøði, Erik Werlauff, fast, at nevndin bæði rættarliga og handilsliga fór rætt fram, tá hon keypti partabrøv frá fýra leiðandi persónum í felagnum**

Eftir nógvu umrøðuna í sambandi við handilin bað nevndin í Atlantic Airways herfyri høgt virda danska professaran gera eina løgfrøðiliga meting av málinum, og í síni frágreiðing frá 5. mars 2009 ger professarin greitt, at nevndin gjørdi onki skeivt í málinum.

Erik Werlauff sigur í síni niðurstøðu, at »den beslutning, der i juni 2008 blev truffet af bestyrelsen for Atlantic Airways om at lade selskabet købe halvdelen af de aktier, der ejedes af selskabets 4 ledelsesmedlemmer, var både retmæssig og forretningsmæssigt velbegrundet.«

**Víðari sigur hann í síni niðurstøðu:**

»Beslutningen og gennemførelsen af denne strider ikke mod børsretlige forskrifter, og den strider heller ikke mod bestemmelser i aktieselskabsloven, herunder lighedsgrundsætningen i §17, generalklausulen i §63, tilbagebetalingsreglen i §113 eller erstatningsreglen i §140.«

Erik Werlauff staðfestir í síni frágreiðing, at nevndin tók sína avgerð samsvarandi heimild í §3A í viðtøkunum hjá felagnum, ið samsvara við §48 í partafelagslógini. Eisini staðfestir hann, at nevndin ikki á nakran hátt gjørdi seg inn á lógarásetingina um, at partaeigarar skulu viðfarast eins.

Partafelagslógin ásetir, at øll partabrøv hava eins rætt, men hesin rættur er ikki absoluttur, vísir professarin á. Hann skrivar í frágreiðingini:

»Lighedsgrundsætningen i aktieselskabslovens §17 kræver naturligvis ikke, at fordi selskabet køber aktier fra nogle aktionærer, skal det købe aktier fra alle, eller fordi selskabet giver en overpris på 10 pct. for nogle aktier, skal det tilbyde samtlige aktionærer en tilsvarende overpris for deres aktier. Tværtimod kan det være sagligt velbegrundet, at selskabet udnytter en mulighed, der opstår for at købe nogle bestemte aktier tilbage og herved giver en overpris på op til 10 pct. for disse, således som bemyndigelsen i vedtægternes §3A lyder på.«

Erik Werlauff leggur dent á, at nevndin var í sínum fulla rætti at halda, at hennara avgerð at keypa partabrøvini var í felagsins áhugamálum, tí støðan var, at fýra leiðandi persónar í felagnum vildu selja samstarvsfelaga hjá Atlantic Airways partabrøv fyri høgan kurs. Hetta kundi reisa spurnartekn við, hvussu óheft leiðslan fór at gerast, og tí mátti ein avgerð takast í málinum.

Nevndin kundi ikki nokta leiðandi persónunum at selja partabrøvini til samstarvsfelagan, tí ongar forskriftir funnust, sum bannaðu hesum. Men nevndin gjørdi greitt, at hon var ímóti søluni, og tí gjørdu leiðandi persónarnir sjálvir av at lata vera við at selja. Í staðin keypti nevndin so helvtina av teirra partabrøvum og gjørdi í nýggjari avtalu greiðar forskriftir um keyp og sølu av partabrøvum hjá leiðandi persónum í framtíðini.

Erik Werlauff staðfestir í frágreiðingini, at »bestyelsen handlede ikke blot forretningsmæssigt fornuftigt, men iagttog også en række børs- og selskabsretlige formalia.«

Í hesum sambandi vísir hann á, at nevndin syrgdi fyri, at handilin fór fram, tá handilsvindeygað var opið, nevndin spurdi regluvørð felagsins, um tað var í lagi at gjøgnumføra handilin, og eisini varð handilin beinanvegin almannakunngjørdur, soleiðis sum lógin fyriskrivar.

Eisini sigur Erik Werlauff: »På denne baggrund må jeg konkludere, at bestyrelsen for Atlantic Airways har udøvet et fornuftigt forretningsmæssigt skøn over, hvad der tjente selskabets interesser bedst i den konkret opståede situation.«

Erik Werlauff hevur skrivað fleiri bøkur um eitt partafelagsrætt, børsrætt og onnur løgfrøðilig viðurskifti og hevur síðan 1988 verið professari í løgfrøði við lærda háskúlan í Aalborg.

*Christian Andreassen,*
*nevndarformaður,*
*P/F ATLANTIC AIRWAYS*

# Pensjón ella lummaull

TÍÐINDASKRIV
*frá Javna*

Eisini eini 35 fólk við menningartarni liva undir somu óvirðiligu skipan, sum tey á psykiatrisku deild og fáa onga pensjón, men bert lummapening. Men nú eigur tíðin at vera komin hjá okkum at gera sum grannalond okkara og fara burtur frá teirri skipan, ið kallast bústovnar, so vit ikki framhaldandi ógrundað gera mismun á menniskjum.

Útvarpið tók í sendingini Skannarin mánadagin 9. mars og aftur í tíðindunum 12/3 upp støðuna hjá teimum, ið verða verandi á psykiatrisku deild, tí onki sambýli er tøkt til teirra. Henda støðan er, hóast politikkarar í áravís hava ætlað at fáa hesi fólkini út av landssjúkrahúsinum og í vanlig sambýli at búgva. Útvarpið skal hava tøkk fyri at hava varpað ljós á hetta álvarsmál.

Í hesum sambandi var nomið við, at fólk, ið liggja longri tíð á sjúkrahúsi, ikki fáa pensjón men umleið 1000 kr. um mánaðin í lummapengum. Tað merkir, at tey ikki sjálv kunnu keypa sær eitt klæðnaplagg ella geva einum skyldfólki eina føðingardagsgávu, tí tey hava ongar pengar um hendur. 30 kr. um dagin røkka jú ikki langt.

Hetta er sjálvsagt ein sera óvirðilig støða, og sjálvsagt áttu hesi fólkini eins og flest øll onnur, ið ikki eru fullfør, at fingið eina pensjón, og so rinda hóskandi upphædd fyri innivist.

Javni má í hesum sambandi gera vart við, at umframt hesi fólkini á psykiatrisku deild – eg haldi at talan var um eini 20 fólk – eru eisini eini 35 fólk við menningartarni undir somu óvirðiligu korum.

Tá Eirargarður varð bygdur og fólk við breki komu aftur til landið eftir útlegd í Danmark, fluttu hesi inn á stovnin Eirargarð. Tá varð skipanin tann, at stovnurin tók sær av øllum, og fólk fingu eitt sindur av lummapeningi útgoldnan. Seinni fluttu summi av hesum út í ymiskar smærri bústovnar at búgva, men fíggjarviðurskiftini vórðu ikki broytt.

Nøkur ár seinni varð tíbetur farið burtur frá hesi skipan. Farið var undir at skipa sambýli, har fólk við breki kundu leiga fyri ein rímiligan kostnað. Hesi fáa sína pensjón og rinda ávísa upphædd fyri kamarið umframt ávísa upphædd fyri ljós, hita, mat og tílíkar útreiðslur. Hetta er fíggjarliga ólíka virðiligari skipan, tí tá rinda tey við síni pensjón fyri innivist og hava eftir til at keypa sær klæði, til flutning og tað, sum nú tørvar.

Tað syrgiliga er, at tey, sum av fyrstantíð fluttu inn á Eirargarð – summi teirra eru framvegis á Eirargarði og onnur búgva í heimligari umstøðum á smærri bústovnum – tey fáa framvegis bara lummapengar.

Her er kanska neyðugt at gera greitt, at bústovnar og sambýli eru heilt hvør sítt. Bústovnar fáa allan rakstrurin játtaðan á fíggjarlógini og búfólkini fáa lummapening útgoldnan av játtanini hjá stovninum. Á sambýlum hinvegin leiga búfólkini eitt kamar – onkustaðni eina lítla íbúð – og rinda við síni pensjón.

Nú eigur tíðin at vera komin hjá okkum at gera sum grannalond okkara og fara burtur frá teirri skipan, ið kallast bústovnar, so vit ikki framhaldandi ógrundað gera henda mismun á menniskjum. Tað hevði sømt seg einum framkomnum samfelag.

# Jóanes í Funningi nýggjur formaður

TÍÐINDASKRIV
*Eysturoyar Tjóðveldisfelag*

Á ársaðalfundinum hjá Eysturoyar Tjóðveldisfelag, sum varð hildin í Bygdahúsinum á Strondum ígjárkvøldið, varð Jóanes Johannesen úr Funningi valdur til formann. Formaðurin í mong ár, Jónsvein Bjartason, ynskti ikki at halda fram, orsakað av ov stórari arbeiðsbyrði. Hann er maskinmeistari á saltfiskavirkinum Vaðhorn. Nýggja nevndin í felagnum er annars mannað, og hevur eftir aðalfundin skipað seg soleiðis: **Jóanes Johannesen**, Funningi, formaður og aðalstjórnarlimur. **Jónsvein Bjartason**, Strondum, næstformaður. **Tórbjørn Jacobsen**, Glyvrum, ritari. **Herbert Olsen**, Rituvík, peningarøkil. **Olaf í Garði Joensen**, Eiði. **Magni Joensen**, Fuglafirði. **Petur í Túni**, Toftum. **Hallur Ellingsgaard**, Oyndarfirði, tiltakslimur. **Tollakkur Joensen**, Norðragøtu, tiltakslimur.

Ársaðalfundurin valdi eisini limir í Flokstingið, sum verður hildið í Skálavík fríggjakvøldið og leygardagin í komandi viku. 20. og 21. mars. Teir delegeraðu eru: **Jóanes Johannesen**, Funningi. **Dia Ellindson**, Runavík. **Herbert Olsen**, Rituvík. **Olaf í Garði Joensen**, Eiði. **Andras S. Gregersen**, Strondum. **Eigil Rasmussen**, Strondum, tiltakslimur. **Símun á Kinn**, Strondum, tiltakslimur.

Til grannskoðarar felagsins vóru afturvaldir **Fríðfinnur Johnsso**n og **Jógvan Næs**.

Lívligt politiskt kjak var í biohøllini á Strondum, eftir at organisatoriski parturin av avgreiddur. Góða uppmøtingin á fundinum boðar frá, at tjóðskaparpolitiska rørslan er í stórari og støðugari menning. Tingfólkini Annita á Fríðriksmørk og Tórbjørn Jacobsen greiddu frá tingarbeiðnum, og mettu um politisku støðuna. Fundarfólkið greinaði støðuna og yvirhøvur vóru fólk samd við tingmanningini í rikna politikkinum hjá flokkinum, og kritikkurin, sum var havdur á lofti, var ógvuliga konstruktivur.

Semja var um, at hendan samgongan rekst bara fyri vág og vind, mál eru ongi, tað er bara bera og blektaða valdið, sum heldur teimum trimum flokkunum saman í Tinganesi, og støðan, sum heimurin og Føroyar eru í, krevur eina stjórn, sum er arbeiðsfør. Tað hevði verið meira enn nógmikið fyri hendurnar hjá eini stjórn, við greiðum málum fyri samfelagið og tjóðina. Bygningarbroytingar í vinnuni, mentanardubbing, hert politiskt tjóðskaparstríð o.s.fr. Nú er alt bara eitt valdsvakuum. Yvirhøvur kendist tað, sum at tað aftur er farið at vára fyri einum fullveldislandsstýri í landinum, soleiðis at ein endalig uppgerð kann gerast viðvíkjandi seinastu leivdunum í ússaligu hjálandastøðu landsins.

Leikluturin hjá fíggjarnevndarlimum floksins fekk góð skoðsmál. Seriøsur og konstruktivur. Lokalpolitiskt fegnaðust limirnir um almennu íløguraðfestingarnar í oynni, sum vóru partar av fíggjarlógarsemjuni, og líka so nógv argaðust fólk inn á Javnaðarflokkin, sum nú ger alt fyri at bróta semjuna, nú hann sum úlvur á skóg roynir at avreiða hesar íløgur úr oynni aftur, seinast á einum samgongufundi, sum vit enn ikki kenna rættiligu avleiðingarnar av.

Breið semja var um, at eitt hert mentanarstríð eigur at vera skipað, og dyggasta skorðan undir politiska frælsisstríðnum. Íløgur mega í bráðskundi gerast í mál, mentan og egnan samleika yvirhøvur, skal danska mentanarimperialisman ikki kollrenna føroyingin í Føroyum.

Fundurin var lokin um 23-tíðina og tjóðsangurin varð sungin áðrenn hvør fór til sín.